Rótstovnar í føroyskum

Serstakliga við atliti til fleirtal

Eftir Ulf Zachariasen.

1.

Teir fornu rótstovnarnir, atematisku stovnarnir, hava í nýføroyskum mangan tikið seg upp eftir forvitnisligum leiðum. Her verður dentur lagdur á at sýna, hvat snið teir hava í fleirtali, í hvørfalli og hvønnfalli, bæði í bundnum og óbundnum formi. Í hesum førum hevur hitt føroyska kenniorðið oftast annan form enn í íslendskum, *brøðrinir*, *føtrinir*, *hendrinar*, *døtrinar* t. d. — ein formur, sum ikki er serføroyskur, vit finna hann aftur eitt nú í fornum svenskum —, meðan íslendskt hevur *bræðurnir*, *fæturnir*, *hendurnar*, *dæturnar* (<*brœðrnir*, *fœtrnir*, *hendrnar*, *dœtrnar*). Annars er at siga um føroysku formarnar, at teir ikki koma til sjóndar í skrivaðum máli— hin hammershaimbska rættskrivingin byggir jú á fornmálið, tað vil fyrst og fremst siga forníslendskt, og hevur í hesum føri ikki lagt lag í føroyskt.

Taka vit hinar stovnarnar (sjálvljóðastovnarnar og *n*-stovnarnar) og kanna eftir, hvussu teir í kallkyni og kvennkyni í fleirtali eru vorðnir, um kenniorðið kemur afturat, verða vit var við, at fleirtals *-r* altíð verður samanlíkt við *-n-* frá kenniorðinum og hvørvur. Vit skriva *armarnir*, *dagarnar*, *fjaðrarnar*, *granarnar*, *oyggjarnar*, *herðarnar*, *gestirnar*, *vinirnir*, *líðirnar*, *firðirnir*, *vøttirnar*, *grannarnir*, *gøturnar* o. s. fr., men vit siga altíð *armanir*, *daganar*, *fjaðranar*, *gran-*

anar, *oyggjanar*, *herðanar*, *gestinir*, *vininir*, *líðinar*, *firðinir*, *vøttinar*, *grannanir* og *gøtunar*.

2.

Yvirhøvur hava rótstovnarnir sterka støðu í føroyskum. Ikki tí, ein partur av teimum er farin burturúr og verður nú øðrvísi bendur (3. a. og fyri ein part e.). Men hinumegin er ein bólkur av orðum, sum ikki upprunaliga eru rótstovnar, men sum í fornmálinum eisini kundu verða bend so, í føroyskum farin henda vegin burturav: *honk*, *rond*, *bót*, *klógv*, *glóð*, *ont*, *rond*, *spong*, *strond*, *stong*, *tong*, *rond* (sbr. íslendskt). Eisini *bonkur*, *vond*, *trom*, *dorg*, *vomb*, *rás*, *frúgv* og *brúgv*. Øll hesi orð laga seg væl eftir føroyskum bendingarsnið, og vit fáa: *glóð-gløður*, *tong-tengur*, *rás-ræsur*, *brúgv-brýr* o. s. fr. Serliga megnað tykist skiftið *o-e* (upprunaligt *i*-umljóð *a-e*, seinri kámað av *u*-umljóðnum *a>ǫ*) at vera, *tong-tengur* t. d., tað hevur haft serstaka atdráttarmegi, og tað er forvitnisligt at síggja, at orð, ið inn eru komin í alranýggjastu tíð, síðstu 10—20 árini, laga seg náttúruliga eftir tí: *kartong-kartengur*.

Taka vit gongdina úr fornmálinum í føroyskt síggja vit sostatt eina forvitnisliga broyting: frá tí at hava sum høvuðseyðkenni *-r* í hvørfalli og hvønnfalli í fleirtali (*-r* tó í summum orðum burturlíkt, *mús-mýs* t. d., sbr. 3. c.) mótvegis hinum stovnunum, sum her hava *-ar*, *-ir* og *-ur*, hevur hesin orðabólkur, við at sleppa summum orðum og hinumegin at draga onnur at sær, tikið seg fram til at vera ein orðaflokkur hvørs høvuðseyðenni í dag er *i*-umljóð í fleirtali, hvørfalli og hvønnfalli. At hesir formar so í sínum lagi mangan kunnu breiða seg til hvørjumfall við, *tong-tengur-tengrum* t. d., verður ikki gjørt meira burturúr á hesum sinni. Eisini kundi verið mint á hin úrforna javnan millum hvørjumfall í eintali og hvørfall í fleirtali *(hendi-hendur, føti-føtur)*, ein javni sum eisini hevur gjørt vart við seg í føroyskum málvøkstri annars *(træðri-træðrir*, sbr. 3. e.).

Annars leggur ein til merkis tann nakað óregluliga fleirtalsformin t. d. *rengur* av *rong*, vit høvdu her væntað *rongur* (*e*

verður í føroyskum at >*o* framman fyri *ng* og *nk*, uttan so at -g og -*k* í hesum sambondum hava framgómaframburð, tá fáa vit í miðføroyskum vanliga framburðin *ei)*, formar sum *rengur* o. tíl. mugu vera ávirkaðir av t. d. *strendur*, *rendur* o.ø.

Í 3. verða øll orðini viðgjørd soleiðis:

a. Tey, sum eru farin aðrar leiðir, hendir seg horvin úr málinum.

b. Orð, har stovnurin endar við (upprunaliga longum) sjálvljóði.

c. Orð við burturlíktum -*r* í óbundnum formi av hvørfalli og hvønnfalli í fleirtali.

d. Orð oftast við varðveittum fleirtals-*r* framman fyri kenniorðið í hvørfalli og hvønnfalli.

e. Orð, har varðveitt fleirtals-*r* verður grundarlag fyri nýggjum fleirtalsformum og viðhvørt eisini eintalsformum.

3.

a. *mjólk* kemur ikki fyri í fleirtali. Horvið úr málinum tykist *trógv* (<*pró*). Mestsum horvið er *brún*, sum bert er til í einstakari málisku *(líkjast einum í brá og brún)* og í staðanøvnum, orðið er annars burturotað av *brúgv*. *fíggindi* er vorðin vanligur *an*-stovnur. Vanligir *i*-stovnar eru nú *eik*, *geit*, *grind*, *lind*, *nót*, *okn* (átti helst at verið skrivað *ákn*, sbr. 3. e.), *sild*, *skrift*, *váð*, *ørk*. *kinn* er nú o-stovnur, kann tó viðhvørt verða kallkynsorð og *a*-stovnur (*kinnur*, flt. *kinnar*). Annaðhvørt *o*-stovnar ella *i*-stovnar eru *tík* og *vík*.

b. Orð, har stovnurin endar við (upprunaliga longum) sjálvljóð, við gongdini -*rn*-> [dn] í bundnum formi í fleirtali. Til samanburðar við sjálvljóða- og *n*-stovnar kann verða sagt, at í rótstovninum stendur her samgongan -*rn*- herðingarsterkt, meðan hon í hinum stendur herðingarveikt: *brúgv-brýr-brýrnar*, *frúgv-frýr-frýrnar*, *klógv-klør-klørnar*, *kúgv-kýr-kýrnar*, *súgv-sýr-sýrnar*, *tá-tær-tærnar*, *ær-ær-ærnar*. Í part við hesi orð fer fleirtalsorðið *dyr-dyrnar* (við nýgjørdum eintali *ein durur* eftir hvørjumfalli í fleirtali *durum-durunum)*.

Fn. *tó*, før. *tógv*, sum næstan bert er til í fleirtali, og sum

er vanligt í staðanøvnum, hevur formarnar *tør* og *tóm* (vanliga skrivað *tón*). Tað er ikki skrásett í bundnum formi í fleirtali. At hvørjumfals-formurin *tóm* meira enn so kann hava hvørfals- og hvønnfalsvirki, er lætt at skilja, tá vit hugsa um, at orðið javnan verður nýtt við fyriseting (*undir -tóm*), sbr. t. d. uttanáskriftir á brævbjálvum: *Kollafirði, Húsum, Vági* fyri *í Kollafirði, á Húsum, í Vági* o. s. fr. (sbr. 3. e.).

klógv kann í fleirtali hava hjáformarnar *kløur-kløunar* (skr. *kløurnar*). Tann sannroynd, at vit her hava formaparið *kløunar* og *klørnar* er helst atvoldin til, at vit, vegna burturdottið ð, umframt formin *gløðunar* (skr. *gløðurnar*), fleirtal í bundnum formi av *glóð* (sbr. 3. d.), hava ein — stakan — form *glørnar*.

c. Hvørfall og hvønnfall í fleirtali við burturlíktum *-r* gera *gás, lús, mús, maður, naglur, tonn,* flt. *gæs, lýs, mýs, menn, negl, tenn,* í bundnum formi *gæsnar, lýsnar, mýsnar; menninir, neglinir* (ella *neglinar,* orðið hevur lyndi til at vera kvennkynsorð í fleirtalið), *tenninar*. Teir tríggir síðstu formarnir, *menninir, neglinir* (hvønnfall: *menninar* og *neglinar*) og *tenninar* skarast náttúrliga um næsta bólk:

d. Í hesum bólki eru flest orð. Eyðkenni teirra er *-ur* í fleirtali við *i*-umljóð av rót-sjálvljóðnum, har tað ber til, meðan tey yvirhøvur í bundnum formi bert hava *-r* í fleirtali: *bonkur-benkur-benkrinir* (umframt *beinkir-beinkinir* (skr. *beinkirnir*)), *bók-bøkur-bøkrinar, bóndi-bøndur-bøndrinir, bót-bøtur-bøtrinar, brók-brøkur-brøkrinar, fótur-føtur-føtrinir, hond-hendur-hendrinar, honk-henkur-henkrinar, kartong-kartengur-kartengrinar, mørk-merkur-merkrinar, nátt-nætur-nætrinar, rók-røkur-røkrinar, rond-rendur-rendrinar, rong-rengur-rengrinar, rót-røtur-røtrinar, song-sengur-sengrinar, spong-spengur-spengrinar, stong-stengur-stengrinar, strond-strendur-strendrinar, tong-tengur-tengrinar* og *vomb-vembur-vembrinar* (skriftformarnir eru *benkurnir, bøkurnar, bøndurnir* o. s. fr.)

Tað eigur at verða nevnt, at ymsastaðni í Føroyum, eina mest kanska um Havnar-leiðina, er ikki óvanligt, at *-i-* í

kenniorðinum verður slept, so vit fáa formar sum t. d. *bøtrnar, nætrnar, stengrnar* o. a., t. e. við stavingarberandi *-r-* framman fyri *-n-*.

Eftir at nevna í hesum bólki eru fyrst nøkur orð, har høvundurin ikki (enn ikki) hevur hoyrt ella sæð fleirtalsformar við varðveittum *-r-* framman fyri kenniorðið: *dorg-dergur-dergunar, flógv-fløur-fløunar, frændi-frændur-frændunir, glóð-gløður-gløðunar, ont-entur-entunar, rógv-røur-røunar, trom-tremur-tremunar, vond-vendur-vendunar,* harumframt *rás-ræsur-ræsunar* (skriftformar: *dergurnar, fløurnar* o. s. fr.). Sum sæst, eru orðini ikki nógv í tali, afturat er at siga, at orðini *flógv, frændi* og *ont* ikki eru nógv nýtt, og *dorg, trom, vond* og *rás* hoyra ikki upprunaliga til rótstovnarnar. *glóð* kann, sum nevnt, hava annað snið í bundnum formi í fleirtali (3. b.).

Av skyldskaparorðunum hoyra *móðir* og *dóttir* best uppí her. *móðir* hevur fleirtalið *møður-møðunar* (skr. *møðurnar*) t. e. eisini her hvørvur fleirtals-*r* framman fyri kenniorðið. Orðið er annars ikki so vanligt, í flestum førum verður í staðin nýtt orðið *mamma. dóttir* varðveitir sítt forna fleirtalssnið og hevur formarnar *døtur-døtrinar* (skr. *døturnar*). Hini skyldskaparorðini fara aðrar leiðir:

e. Orð, har varðveitt fleirtals-*r*, stundum styðjað av radikálum *r*, verður grundarlag fyri nýggjum fleirtalsformum og viðhvørt eisini eintalsformum.

bróðir kann í fleirtali hava formarnar *brøður-brøðrinir* (skr. *brøðurnir*), men kann eins væl fáa annað óbundið snið, sum vit kunnu taka sum høvuðsdømi fyri henda bólk.

Nevnt er (1.), at kallkyns- og kvennkynsorð, ið eru sjálvljóðastovnar ella *n*-stovnar, sleppa sínum fleirtals-*r* framman fyri kenniorðið í hvørfalli og hvønnfall, og vit fáa skiftið *vininir-vinir, gestinar-gestir, líðinar-líðir* o. s. fr. Óivað eftir hesi fyrimynd hava summi av rót-orðunum fingið nýggjar óbundnar fleirtalsformar, og javnlíkt við skiftið *vininir-vinir,* t. d., fáa vit skiftið *brøðrinir-brøðrir. bróður* fær sostatt formarnar *bróðir-brøður* ella *brøðrir-brøðrinir.* Við hesum dømunum sum støði ber til at skilja formagongdina hjá hinum rót-

stovnunum við radikálum *r* og summum øðrum orðum, ið yvirhøvur hava tikið seg upp eftir somu leið (vegna samanblandingina av herðingarveikum *-i(-)* og *-u(-)* og framvøksturin av styði-sjálvljóði (svarabhakti-sjálvljóði), *akr>akur* t. d., verða hesi orð í nýføroyskum mest at rokna sum orð við radikálum *r*. Eisini *móðir* og *dóttir): faðir, systir, fingur* og *vetur* fáa formarnar *faðir-fedrar-fedranir* (skr. *fedrarnir), systir-systrar-systranar* (skr. *systrarnar), fingur-fingrar-fingranir* (skr. *fingrarnir*) og *vetur-vetrar-vetranir* (skr. *vetrarnir*). Tað sæst beinan vegin, at hesi fýra orð (*faðir, systir, fingur* og *vetur)* í einum líkjast frá *bróðir,* nevniliga við at hava fingið nýgjørdan, óbundnan fleirtalsform við *-ar* í staðin fyri *-ir*. Ætlandi kemst hetta av, at tey kallkyns- og kvennkynsorð í málinum, ið frammanundan høvdu radikált *r,* at kalla øll vóru *a*-stovnar og *o*-stovnar og sostatt høvdu *-ar* í fleirtali: *akur-akrar, veðrur-veðrar, fjøður-fjaðrar, livur-livrar* o. s. fr.

Ógvuliga líkur gongdini hjá áðurnevndu orðum er tann vøkstur, ið verið hevur í formaskipanini hjá hesum orðum: fn. *þráðr,* kk., fn. *ertr,* kvk., flt., fn. *kverk,* kvk., fn. *hnot,* kvk. og fn. *tág,* kvk.

tráður hevur í fleirtali — umframt *træðir-træðinir* (skr. *træðirnir)* — eisini *træðrir-træðrinir* (skr. *træðrirnir).*

kvørkrar-kvørkranar (skr. *kvørkrarnar)* er í dag einans fleirtalsorð.

Til formarnar *ertrar-ertranar* (skr. *ertrarnar*) hevur nýføroyskt gjørt ein eintalsform *ertur,* kvk.

Burtur úr orðunum fn. *hnot* og fn. *tág* hevur føroyskt fingið tvey heilt nýggj orð at kalla. Hitt forna fleirtalið av *hnot* var *hnøtr* ella *hnetr,* fornt *ø* er í føroyskum mestsum horvið og farið upp í *e*-bólkin (t. d. *í erva* (<*it efra*), *kemur, svevur, treður),* men ætlandi tíðliga í tíðini hava vit í hesum orðinum, í samsvar við ljóðskifti *o-y* í t. d. *krov-kryvja* (*o* er her *a*-umljóð av *u),* fingið fleirtalsformin *nytr* ella *nytur,* sum í bundnum formi hevur sniðið *nytrinar.* Óbundið fær tað (umframt *nytur*) burtur úr forminum *nytrinar* formin *nytrir.*

Orðið er mest nýtt í fleirtali; í eintali, sum sjáldan kemur fyri, hevur tað sniðið *nytra* — eitt snið, ið ikki er torført at skilja, um vit hugsa um samanblandingina av herðingarveikum *-i(-)* og *-u(-)*. — Fornt *tág* hevði fleirtalið *tægr-tægrinar*. Burtur úr bundnum formi *tægrinar* (skr. *tægrirnar*) hevur føroyskt í fleirtali fingið *tægrir* og hevur nýgjørt eintalsformin *tægr*.

Sum sæst, hevur fleirtalið í hesum orðum sterka støðu í føroyskum — *kvørkrar* er vorðið fleirtalsorð burturav, burtur úr *ertrar* verður gjørt eintal av nýggjum, og burtur úr *nytrir-nytrinar* og *tægrir-tægrinar* verður gjørt eintal, so orðini nóg illa kennast aftur. Sæð í hesum samanhangi er ikki so torført at skilja, at fleirtalsformarnir *tør* og *tóm* av *tógv* (sbr. 3. b.), sum Chr. Matras nevnir í doktararitgerð síni[1] á bls. 289—290, mestsum hava vunnið á eintalinum.

Annars er at nevna, at *ertrar* í hvørsfalli hevur formin *ertna*, sum sæst av samansetingunum *ertnahamur*, *ertnakíkur* og *ertnasúpan*. Formurin er óregluligur, men í nýføroyskum kortini heilt fastur. — Tann, ið hetta skrivar, hevur altíð verið stórliga í iva um rættleikan í at seta føroyskt *okn* ella *ákn* (sbr. 3. a.) í samband við hitt forna *álpt* ella *ǫlpt*. Men nú hann er vorðin varur við hin í føroyskum regluliga formin *ertna*, er ivi hansara heldur enn ikki viknaður. *ákn* verður so ið hvussu er ikki einasta føroyska dømi um óregluligt *-na* í hvørsfalli í fleirtali av einum fornum rótstovni, sbr. t. d. eitt so serkent staðanavn sum *Oknadalur* í Vágum, at *-n-* úr hvørsfalli kann hava otað seg inn í hini føllini, bæði í eintali og fleirtali, er væl trúligt — *Oknadalur* hevur dagliga verið havdur á munni, so ásýniligur og týdningarmikil hann er, eitt nú sum ýti, meðan svanur, *ákn* ikki hevur verið hvønndagsgestur. Og gongdin *álptn>ákn* tykist greið, *l* kann hvørva framman fyri fleirihjáljóða-bólk (*tálkn>tákn*), og *-ptn-* (*>-pn-*) kann verða at *>-kn-*, t. d. *aptna>akna*, *vápn>vákn*.

4.

Um onkur lesari hevur fingið tað burtur úr hesum reglum,

at hann, ið skrivað hevur, við teimum hevur ætlað at ruddað slóð fyri rættskrivingarbroyting, at vit t. d. skulu skriva *hendrinar, føtrinir, døtrinar* í staðin fyri *hendurnar, føturnir* og *døturnar* — so fer hann skeivur. Tað er ikki torført at finna ymisk brek í føroyskari rættskriving, men enn er hon so nýggj og lítið fest, lítið »sjaknað«, at hon fyrst og fremst eigur at fáa *frið*. Tað einasta, høvundurin í hesum sambandi kundi hugsað sær at skotið upp, er at vit í staðin fyri *okn* skriva *ákn,* at vit í staðanøvnum kanska skriva *-tóm* í staðin fyri sum nú *-tón,* og at vit heilt sleppa stavingarháttinum *nitra* til frama fyri *nytra.*

SUMMARY

The paper deals with the root stems (athematic stems) in Faroese. In Old-Norse, these stems are mainly characterized by the plural *-r,* in contrast to the vowel-stems and *n*-stems, whose plural is formed by either *-ar, -ir* or *-ur,* but in Faroese they have, by separating some words (3. a. and partly e.) and attracting others, developed to be a group mainly characterized by *i-Umlaut* in the plural (to some degree veiled by *u*-Umlaut *a>o*). Each word is treaded in 3. It is pointed out (3. d.), that several of the words, when definite, have kept their plural *-r,* which is else assimilated to the *-n-* of the article — a fact which does not clearly show from normal Faroese orthography. Furthermore it is shown (3. e.), that in some cases a preserved old plural form has given rise to new plural forms, which may sometimes spread into the singular as well.

BÓKMENTIR

1. *Chr. Matras:* Stednavne paa de færøske Norðuroyar. Aarbøger for nordisk oldkyndighed og historie 1932.